# Persónlig álop fjala ikki veruleikan

FINNUR HELMSDAL
løgtingsmaður



Tað er nógv nýtt, og er tí eisini eitt rættiliga væl kent fyribrygdi, nevniliga at ein flytur orðaskiftið yvir á persónliga bógvin, tá ein hevur tikið botn fakliga. Og nú tað snýr seg um bútilboð til menningartarnað, jú, so roynir landsstýrismaðurin enn eina ferð at seta mín persón í ringt ljós, heldur enn at siga sum er. Onkuntíð tá eg havi víst á okkurt Almannastovuni viðvíkjandi, gongur HPS runt og sigur starvsfeløgum og øðrum, at Finnur hevur trupulleikar og undirlutakenslur í mun til Almannastovuna. Nú tað snýr seg um menningartarnað, er Finnur illsintur.

Men ynskir Hans Pauli at verða viðgjørdur á persónliga bógnum, so er tað í hvussu er ikki til hansara fyrimuns. Eri eg illsintur, so er Hans Pauli Strøm ein óstýriligur beserkur. Tað er heldur reglan enn undantakið, at landsstýrismaðurin situr saman bitin og starir niður í borðið, tá hansara mál verða viðgjørd í tinginum. Blommureyði roðin, sum spakuliga breiðir seg um allan heysin, avdúkar sinnisstøðuna hjá manninum. Og tá hann so trínur pallin, sær tú eina tomat við flúgvaraoyrum, við eygum sum ikki duga at fanga fokus. Tú sær, hvussu hann berjist fyri at halda beserkinum innanborða. Hetta kann tykjast eitt sindur ógvusligt viðhvørt, tá beserkurin er so stórur í klæntrasliga kroppinum. Alt ofta bert tí onkur er ósamdur við honum í onkrum. Nokk eri eg illsintur, men eg komi ikki Hans Paula Strøm til knýggja tí viðvíkjandi.

Eitt er at vera illsintur, men sigur man so eisini ósatt omaná, tá kunnu tosa um ein, ikki bara óhepnan, men sanniliga eisini vandamiklan, cocktail. Ikki minst um vit tosa um persón, sum situr í landsstýrismannasessi.

**Ósannindir og skeivleikar**

Tað mest ótrúliga við Hans Paula Strøm er, at er hann fyrst fangaður í at mistaka seg, so ger hann tað bara í dupult mát næstu ferð. Dømi um hetta er frítíðarskúlin á Tvøroyri, málið um miðnámsskúlan/ ellisheimið í Vági, málið um játtanir til ellis- og røktarheimspláss, hagtølini fyri tørvi á ellis- og røktarheimsplássum, tá hann á skrift bar fram hóttanir og ákærur móti løgtingsskrivstovuni og trivnaðarnevndini í málinum úm Barnaverndarlógina, málið viðvíkjandi serdagsstovninum á Argjum og nú hetta málið. Bert fyri at nevna nøkur. Men tað er kanska ikki so løgið, at landsstýrismaðurin nýtur slíka framferð. Hann hevur funnið út av, at løgmaðurin hevur givið honum ein blankokekk soleiðis, at hann kann gera snøgt sagt tað, honum lystir, einki fær avleiðingar fyri hansara landsstýrismannastarv. Øll oman fyri nevndu málini skuldu sjálvsagt havt elvt til, at løgmaður segði Hans Paula Strøm úr starvi, men ikki ein gang summurin av øllum teimum fær løgmann til so mikið sum at lyfta aðra eygnabrúnna. Hans Pauli veit tí, at hann er friðaður í flokki C, og kann hann tí fyrilitarleyst siga tað, sum í løtuni er best at siga ella svara tingmonnum og øðrum. Hesin løgmaðurin hevur eins og undanfarni, ikki stóru trupulleikarnar av at siga landsstýrismonnum úr øðrum flokkum úr starvi, men loypur ketan av, tá tað kemur til eins egna flokk. Og hevur hesin hugburður bjargað Hans Paula Strøm meira enn eina ferð.

Í tinginum mikudagin bar Hans Pauli Strøm fram bæði ósannindi og skeivleikar, tá eg spurdi hann um, hví nøkur menningartarnað skuldu flyta aftur á Eirargarð. Eg vísi á hesar skeivleikar og ósannindi í lesarabrævi dagin eftir, men hvat ger HPS, jú, hann leggur eftir mær persónliga og kallar meg illsintan lygnara í yvirskriftini. Fólk, sum halda seg hava óavmarkað vald, tey kenna sjaldan mørkini.

**Prógvini fyriliggja**

Eg ætli mær tó ikki enn eina ferð at greiða Føroya fólki frá, hvussu landsstýrismaðurin hevur sagt ósatt og somuleiðis villleitt tingið. Eg fari ein falt at leggja prógvini á borðið. Prógvini finni eg í upptøkunum av øllum tí, sum verður sagt í tinginum. Lesarin skal her sleppa at lesa eina beinleiðis avskrift av teimum ósannindum og skeivleikum, sum HPS bar fram henda dagin.

Fyrstu ferð landsstýrismaðurin tók orðið í málinum, segði hann m.a. soleiðis: ...Í samband við at Serstovnadeildin tók avgerðina um at flyta búfólkini aftur á Eirargarð, varð málið sent til hoyringar hjá avvarðandi, starvsfólkum og fakfelag teirra. Og tá freistin var úti (ígjar) var einki hoyringssvar innkomið. Og eingin, sum málið snýr seg um, hevur sett seg upp móti avgerðini.

Her sigur landsstýrismaðurin ósatt, tí álitisfólkið á stovninum bar eitt hoyringssvar út á Serstovnadeildina og avleveraði tað har dagin fyri, at freistin var úti. Í hoyringssvarinum stendur, at langt frá øll taka undir við avgerðini, um at flyta búfólkini út á Eirargarð.

Aðru ferð landsstýrismaðurin tekur orðið, sigur hann millum annað, at kvaliteturin á teimum sambýlunum, sum eru, er ónøktandi.

Triðju ferð hann tekur orðið, sigur hann m.a.: ...fari at biðja spyrjaran lesa grein í onkrum fakblaði, sum fyrrverandi leiðari á Serstovnadeildini skrivaði fáar mánaðar, eftir at eg(HPS) bleiv landsstýrismaður. Høvuðsákæran hjá greinaskrivaranum var, at man hevði fingið sambýli, sambýli, sambýli...og at hesi vóru lappaloysnir, lappaloysnir, lappaloysnir... Hans Pauli Strøm segði við hesum, at øll sambýlini vóru lappaloysnir, og merkir tað, at hann kolldømdi øll sambýlini.. Leggja vit so tað saman við orðini, hann segði í øðrum umfari, nevniliga, at kvaliteturin á sambýlunum er ónøktandi, kann nakar so vera í iva, um hvat landsstýrismaðurin segði. At hann so eisini hugleiddi um eitt meira varierað bústaðartilboð reingir einki við tann veruleikan, at hann kolldømdi øll sambýlini. At tað so var illsinnið, sum kanska tók ræðið á honum, og at hann tí tók nakað rívan til, tað er so ein onnur søga.

**Hampuligt betri enn vánaligt**

Nú eru ikki øll, sum vara av bústovninum við Sundsvegin, samd um, at tað er nøkur vanlukka, at fýra búfólk verða flutt út aftur á Eirargarð. Hetta bæði tá tað snýr seg um starvsfólk og avvarðandi. Onkur teirra hevur sagt við undirritaða, at tey halda at Eirargarður er betri loysn enn Sundsvegur. Grundgevingin er hvørjaferð, at fysisku karmarnir eru betri. Tað sigur seg sjálvt, at letur tú fólk búgva og starvast undir vánaligum og óvirðiligum umstøðum nóg leingi, so vilja hesi fólk, fyrr ella seinni, taka ímóti so at siga øllum við útrøttum ørmum, bert talan er um onkra betring. Hevði eg eina fyritøku, og eg lat ein av seljarum mínum koyra runt í einum 20 ára gomlum bili, so hevði sami seljari við gleði tikið ímóti einum 12 ára gomlum, tí hesin uttan iva var í betri standi. Men tað er neyvan gott fyri nakað, at ein stjóri letur seljara koyra runt til kundarnar í einum 12 ára gomlum bili. Hevur avvarðandi leiðsla frá byrjan verið greið yvir, at viðurskiftini við Sundsvegin vóru út av lagi, er tað álvarsligt og meira enn átaluvert, at engin hevur gjørt nakað við trupulleikan. Nevniliga at syrgja fyri, at búfólkini fingu meira hóskandi bústað. Henda misgerðin verður ikki gottgjørd, við at fólkini nú verða flutt út á Eirargarð. Heldur verður misgerðin sett í perspektiv. Tað er ikki gott nokk ella ílagi, at landsstýrismaðurin góðtekur, at menningartarnað verða flutt úr sambýli út aftur á Eirargarð, sjálvt um tað møguliga er talan um fyribils loysn. Hvørki menningartarnað ella sinnisjúk eiga at búgva har úti. So er tað sagt. Loysnin á tí trupulleikanum er at finna ella byggja egnað hús til endamálið. Loysnin er IKKI at flyta búfólkini út aftur á Eirargarð. Hampuligt er vanliga betur enn vánaligt. Men hampuligt er ikki gott nokk til okkara menningartarnaðu 2006.

Ráð míni til Hans Paula Strøm eru: Halt teg til málið næstu ferð, tað tænir øllum, eisini tær, betur.

*Skattakærunevndin:*

## Upplýsingar frá kærara ongan týdning í málsviðgerð!

ÓLI JACOBSEN



Í seinasta FF-blað greiddu vit frá, at vit ikki høvdu fingið svar frá skattakærunevndini upp á okkara umbøn, at eitt skattamál viðvíkjandi skatting av kosti hjá fiskimonnum varð tikið uppaftur grundað ein hóp av nýggjum tilfari, sum vit høvdu útvegað í málinum.

Svarið kom kortini sama dagin, sum blaðið varð prentað. Hetta svar er søguligt í føroyska løgsøgu. Tað var nevniliga, at tað ger tað sama, hvussu eitt mál verður upplýst fyri nevndini. Niðurstøðan verður kortini tann sama!

Sagt verður orðarætt:

***Tá tulkingin og málsviðgerðin hjá Toll- og Skattstovu Føroya í øllum førum síðani miðskeiðis í 90-unum er í samsvar við hesa áskoðan, eru nýggju upplýsingarnar frá kæraranum, sum lýsa, hvussu siðvenjan hevur verið fyrr, ikki av týdningi fyri avgerðina.***

Tilfarið, vit hava útvegað nevndini, er um siðvenju síðan 1953, sum er útilokað frá málsviðgerðini, so nevndin kundi fáa "grundarlag" fyri at staðfesta eina sera ivasama lógartulking, sum Toll og Skatt ger meira enn 40 ár seinni.

Hetta er nýtt met í skipaðum rættarloysi. Lesast kann um málið á okkara heimasíðu: www.fiskimannafelag.fo

*Framhald av síðu 10*

Sjálvur kenni eg nógv fólk, sum hava verið knýtt at skúlanum, og sum geva Páll sama ummæli.

**Tað er kanska leiðsluni, tað er galið við!**

Spurningurin er so, hvussu tað kann bera til, at ein lærari, sum fær eitt slíkt ummæli frá fyrrverandi stjóra, sum hann hevur arbeitt saman við í 16 ár, nú skal blakast út av sínum arbeiðsplássi í vanæru.

Tað er eingin ivi um, at hetta hevur samband við nýggju leiðsluni á skúlanum, sum tók við fyri tveimum árum síðani.

Sum tað skilst, er hon fullkomiliga blottað fyri samstarvs- og leiðslueginleikar, sum tað eisini er komið fram í bløðunum. Hetta skapar í sær sjálvum ótryggleika á skúlanum.

Men tað mest ódámliga er, at hjá hesi leiðslu finst eingin feril av menniskjansligum atliti.

Páll er komin fyri teirri vanlagnu at vera sjúkur í eygunum. Hetta hevur ført til longri sjúkralegur og fráverur.

Fyri at verja restina av sjónini ráddi læknin honum til at biðja um at sleppa at arbeiða niðursetta tíð. Einhvør leiðsla á einum arbeiðsplássi vildi staðið á høvdinum fyri at gingið einum slíkum ynski á møti í stundini. Bæði av menniskjansligum orsøkum, men eisini tí, at hetta vildi verið í samsvar við einhvønn starvsfólkapolitikk. Hjá tí almenna skuldi hetta eisini verið í samsvar við politikk fyri fólk við skerdum førleika. Tað er eisini váttað frá fleiri síðum, at henda umbøn væl hevði kunnað verið játtað uttan hetta skapti trupulleikar fyri skúlan.

Men eitt slíkt menniskjansligt atlit avvísti leiðslan á Vinnuháskúlanum at vísa. Hon royndi sum longst at nokta fyri hesi umbøn, og tá hon meira ella minni varð kroyst til tess, fekk Páll hetta aftur í aðrari smáligheit, sum hann annars hevði notið ríkiligt av frammanundan.

Páll hevur tann eginleika, at hann sigur sína hugsan, og hetta er tað ringasta ein kann gera í hesum landinum, og sum tað skilst ikki minst á Vinnuháskúlanum. Páll heldur, at somu reglur skulu galda fyri øll starvsfólk, og hetta er grundin til tað innlit, sum hann hevur biðið um fyri at fáa greiðu á mannagongdini við eftirútbúgving av lærarum.

Tað tykist greitt, at tá hetta er komið so vítt, er tað eisini ein avleiðing av ”vi alene vide” leiðsluhugburðinum á skúlanum. Har fólk kenna seg vird á sínum arbeiðsplássi, hevði hetta neyvan verið hent.

**Jógvan hevur ábyrgdina**

Sum tað skilst hevur stjórin bert bíðað eftir einum páskoti fyri at sleppa av við Páll. Eitt páskot, sum tað vísir seg nú einki at vera vert samb. landsstýrimanninum.

Tað er kortini eingin ivi um, at tað er Jógvan á Lakjuni, ið sum landsstýrismaður hevur evstu ábyrgdina av, hvat ið hendir við Páll. Tað er **hann**, sum hevur sett stjóran við hansara leiðsluhugburði, sum ikki kann hava verið ókendur fyri landsstýrismannin.

Vit eru fleiri sum fylgja við, hvat ið fer at henda á hesum máli, har umdømið og autoriteturin hjá landsstýrismanninum stendur uppá spæl.

Men vit sum kenna Jógvan hava framvegis tað álit á honum, at hetta mál ikki kemur so vítt, sum tað liggur í kortunum í løtuni.

**Umdømið hjá Vinnuháskúlanum stendur eisini uppá spæl.**

Men hetta verður eisini ein falliterklering fyri ta leiðslu á Vinnuháskúlanum, sum ikki kann takla eitt starvsfólkamál á øðrvísi hátt enn tað er sett út í kortið.

Um tað eydnast stjóranum at blaka ein av teimum mest royndu og best umtóktu lærarunum út á hesum grundarlagnum, vil hetta vera fullkomiliga oyðileggjandi fyri umdømi skúlans. Tað er nóg illa farið sum er. Men hendir hetta, vendist ikki aftur.

Hetta skulu sovæl stjóri sum landsstýrismaðurin verða greiðir yvir!